# Tað gamla er farið



*Edvard Joensen*

Einstakir veggir standa eftir av gomlu gróthúsunum á Gróthústanga. Onkur hús eru tó, sum laðað eru uppaftur og tak lagt á. Standa sum snøggir varðar yvir tíð, sum farin er.

Longri burtur er nýggja tíðin meira sjónlig. Flogvøllurin og hangarurin, sum fylla væl út í landslagnum. Bæði so og so.

Og bátarnir, sum flóta á Vatninum, eru heldur ikki teir, sum brúktir vórðu til at føra torv við í gomlum døgum.

Í dag eru tað skjóttgangandi plastbátar við leysamotori í reyvini, sum strúka skjótt út í Oyrar ella bara fara damlandi fram við landinum við einum tveimum oddum dyrgjandi hvør í sínum borði.

Gaman í er onkur av gomlu tristunum famvegis at síggja á vatninum. Eisini teir við leysamotori. Verða eisini brúktir til at dyrgja eftir sílum fram við landi.

Og úti á flúgvarabedingini koma teir við stóru »speedbátum« á vogni, sum drigin verður aftur úr stórum bilum. Bátarnir verða flotaðir, og so verður strokið við fullari ferð eftir vatninum.

Serliga seinast í august eru hesir stóru »luksuslinararnir« við øgiligari ferð at síggja. Havhestaungarnir síggja tit. Og teir neyðars ungar, sum her eru vilstir í vón um at sleppa út av Bøsdalafossi og til havs, fáa ikki nógvar møguleikar.

Í gomlum døgum komu embætismenn av Skansanum í Havn vestur at taka gásarungar á Vatninum. Nú eru tað aðrir menn við aðrari ferð, sum taka havhestaungar.

Alt er vorðið nýtt.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, um kvøldið snarar hann í útsynning. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og regn. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og mánadagin yvirhøvur turt, men týsdagin ælingur. Hitin millum 12 og 16 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 5 |
| Nuuk | 4 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 20 |
| London | 20 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 20 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 21 |
| Moskva | -- |
| Berlin | -- |
| Warzawa | 28 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 30 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 31 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 31 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 30 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 997 hPa. í útnyrðing úr Írlandi fer spakuliga í landnyrðing og grynnist.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer í útnyrðing og sunnan fyri lágtrýstið rekur óstøðug luft móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/07 kl. 06[00]–22/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,0°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 4,0 mm – mált frá 21/07 kl. 06[00]–22/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 55,2 mm


I EINUM SAMFELAG
HAR TEY VEIKASTU
HAVA TAÐ GOTT,
HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter
30. juli: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. juli | 11.43 | — | 10.43 | 23.02 | 10.58 | 23.17 | 01.24 | 13.43 | 02.24 | 14.43 | 09.58 | 22.17 | 08.58 | 21.17 | 11.58 | — | 00.39 | 12.58 | 11.28 | 23.47 | 00.24 | 12.43 |
| 24. juli | 00.02 | 12.23 | 11.23 | 23.44 | 11.38 | 23.59 | 02.02 | 14.23 | 03.02 | 15.23 | 10.38 | 22.59 | 09.38 | 21.59 | 00.17 | 12.38 | 01.17 | 13.38 | — | 12.08 | 01.02 | 13.23 |
| 25. juli | 00.44 | 13.19 | — | 12.19 | — | 12.34 | 02.44 | 15.19 | 03.44 | 16.19 | 11.34 | — | 10.34 | 23.10 | 00.59 | 13.34 | 01.59 | 14.34 | 00.29 | 13.04 | 01.44 | 14.19 |
| 26. juli | 01.55 | 14.33 | 00.55 | 13.33 | 01.10 | 13.48 | 03.55 | 16.33 | 04.55 | 17.33 | 00.10 | 12.48 | 11.48 | — | 02.10 | 14.48 | 03.10 | 15.48 | 01.40 | 14.18 | 02.55 | 15.33 |
| 27. juli | 03.12 | 15.38 | 02.12 | 14.38 | 02.27 | 14.53 | 05.12 | 17.38 | 06.12 | 18.38 | 01.27 | 13.53 | 00.27 | 12.53 | 03.27 | 15.53 | 04.27 | 16.53 | 02.57 | 15.23 | 04.12 | 16.38 |

5 707265 100050 >